## Minningarorð um

# Elin Mariu Gregersen

Góða omma

Nú er tað eitt ár síðani, at tú ikki orkaði at stríðast meira. Tú hevði eina stutta sjúkralegu. Fyrst í apríl mánaði fekst tú boðini, at tú hevði krabbamein, og longu á morgni 26. juni andaðist tú. Tað er so løgið, at tú ikki ert ímillum okkum longur, og eg sakni teg nógv.

Tá er gott at hava nógv góð minnir. Eg minnist, tá ið eg sum smágenta plagdi at koma inn til tín at ferðast – sum eg elskaði tað! Tað var so spennandi at koma til Syðrugøtu, har var so nógv lív í. - Stórur vøruhandil, Tøtingarvirkið, stórt spælipláss og so sandurin, jú vissuliga var tað ein góð tíð. Altíð slapp eg at liggja í tínari stóru dupultsong. Um morgunin, tá ið eg kom upp, hoyrdi eg útvarpið – hart frá. Úthurðin stóð opin, so mann hoyrdi aldurnar frá sandinum niðan í húsini. Tú hevði verið í Valhøll og keypt nýtt franskbreyð, sum tú borðreiddi fyri mær. Síðani setti tú teg niður við komfýrin við stokkunum og prátaði við meg.



Um sumrarnar, tá vit hoyggjaðu uppi í gerðinum, plagdi tú at koma niðan við nýbakaðum pannukøkum. Altíð vart tú so hugnalig og dugdi at seta ein serligan dám á løtuna.

Tá ið eg var 15 ára gomul, kom eg við tær í summarhús, og har høvdu vit tað gott. Vit vóru nógvar súklutúrar, vóru á strondini, ótu góðan mat o.s.fr. Tú elskaði at vera niðri í summarhúsinum á Blåbærvej, har tú vart hvørt summar í nærum 40 ár.

Tey seinastu árini blivu vit báðar sera tættar. Eg kom ofta inn til tín við stokkum, og vit báðar kundu práta saman í tímavís niðri í køkinum um mangt og hvat afturvið lekrum heimabakaðum. Tað var eisini so hugnaligt at lurta, tá ið tú m.a. greiddi frá tíðini úti í Heiðunum, og tá ið tú og abbi vóru ung.

Eg fari at sakna teg nógv, omma, og sigast kann, at Syðrugøta er ikki tann sama, nú tú ert farin.

Hvíl í friði til vit síggjast aftur.

Eg endi við einum ørindi úr sanginum "Mamman" hjá MC Restorff, sum myndar teg so væl:

*Hvønn tíma at síggja teg tita, gjøgnum*
*trappur inn, út, inn, út, inn.*
*So sjáldan at síggja teg sita og bert*
*njóta tað hond undir kinn.*
*Tað er so, vit teg fara at minnast, tú,*
*sum øllum ein tænari var.*
*Hvar á foldum vit enn kunnu finnast,*
*er tað løgið, tú ert okkum kær.*

**Elin Maria**

## Andlát og jarðarferðir

**Osvald Hansen Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 24 juni, 87 ára gamal.

**Jacob Joensen, Hvannasund,** vanliga nevndur Jakki, búsitandi á Norðoya Røktarheimi, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikudagin, 80 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Hvannasunds kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Jakki kunnu lata Hvannasunds kirkju eina peningagávu, Konta í peningastovunum.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Prógvhandan á Fiskivinnuskúlanum

Mikudagin 24. juni fingu 12 næmingar HIF-prógv (prógv fyri Hægri útbúgving innan fiskivinnu) og tveir lærlingar fingu prógv í fiskavirking og reiðskapstøkni á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.

**Næmingarnir eru:**
**Fremra rað:** Michel Nielsen, Vestmanna, Lena C. Poulsen, Streymnes, Jóna M. Davidsen, Kollafjørður, Rósa Egholm, Tórshavn, Elisabeth Strømsten, Norðagøta, Bjartur Tórhalsson, Vestmanna og Harry Jacobsen, Toftir.
**Aftara rað:** Símun Pauli Ejdesgaard, Eiði, Hallur Johannesen, Norðskála, John Martin Andreasen, Vestmanna, Andras Mikkelsen, Syðrugøta, Magnus Fredrik Joensen, Kvívík (yrkisútbúgving innan reiðskapstøkni), Per Martin Gregersen, Gøta og Theodor T. Thomassen, Miðvágur (yrkisútbúgving innan fiskavirking).

*Mynd: Fiskivinnuskúlin*



# Fimm ættarlið

Hannethea Danielsen úr Saltnesi, sum er 91 ára gomul, bleiv um árskiftið olduromma at trimum dreingjum: Ragnar og Liam (tvíburar) og Valdemar. Tei búgva í ávikavist Thisted og Frederikshavn, har døturnar hjá Hannetheu eisini búgva. Hannethea var við til barnadópin hjá teimum



*F.v.: Nelly (langomman), Hannethea (olduromman), Frederik (pápin) við Valdemar og Jeanette (omman).*



*Aftast f.v.: Heidi (omman) og Molly (langomman). Fremst f.v.: Camilla (mamman) við Liam og Hannethea (olduromman) við Ragnari*